# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Serbia fer ongantíð at viðurkenna Kosovo, og vit fara at stríðast við hond og fót ímóti loysingini*
*(serbiskur talsmaður)*

# Pakistanar valdu broyting



*Pakistanar eru troyttir av ófriði og yvirgangi og valdu broyting hesaferð*

**Veljararnir í Pakistan atkvøddu í gjár fyri broyting og góvu stjórnarflokkinum og teimum víðgongdu islamsku flokkunum ein frammaná**

Tann stóri sigursharrin á pakistanska valinum í gjár má sigast at vera flokkurin hjá fyrrverandi forsætisáðharranum Nawaz Sharif. Eisini flokkurin hjá Benazir Bhutto stóð seg væl, men flokkurin fekk tó ikki tær nøgvusamkensluatkvøðurnar, sum teir flestu eygleiðararnir høvdu væntað.

Hóast uppteljingin ikki var liðug um middagsleitið, vildi almenna sjónvarpið vera við, at teir báðir stóru andstøðuflokkarnir, PML-N hjá Nawaz Sharif, og PPP hjá Benazir Bhutto, høvdu vunnið valið. Tað váttaði flokkurin hjá Pervez Musharaf, forseta eisini.

- Vit eru til reiðar at fara í andstøðu, um úrslitið verður, at vit hava tapt, segði ein talsmaður hjá PML-Q, sum er flokkurin hjá Musharaf.

Undan valinum í gjár var PML-Q størsti flokkur í tjóðartinginum við 130 tinglimum, men vóru forsagnirnar um middagsleitið eftirfarandi, fekk flokkurin bara 25 tinglimir í gjár.

Eisini samgongan av islamskum flokkum, MMA, fekk eftir øllum at døma ein dyggan frammaná. Fyribilstølini vístu, at flokkurin fær minni enn fimm tinglimir hesaferð ímóti 50 á seinasta vali.



*Pervez Musharaf, forseti, hevur lovað at viðurkenna úrslitið av valinum, sjálvt um tað gekk honum ímóti*



# Serbiskir sendiharrar til hús

**- Serbia fer ongantíð at lata Kosovo frá sær, og vit fara at berjast við hond og fót fyri okkara rættindum. Tað sigur serbiski forsetin**

Boris Tadic, forseti, fekk í gjárkvøldið høvi til at siga limalondunum í ST-trygdarráðnum, hvat hann og serbiska fólkið halda um avgerðina hjá meirilutanum í Kosovo at loysa landspartin frá Serbia.

- Serbia fer ongantíð at viðurkenna eitt sjálvstøðugt Kosovo. Vit fara ikki at lata Kosovo frá okkum, og vit gevast ikki, fyrr enn vit hava fingið okkara rættindi, segði Boris Tadic í ST-trygdarráðnum.

Hann kundi frøast um, at tað er ósemja í trygdarráðnum um Kosovo. USA, Bretland og Frakland taka undir við sjálvsstýrislýsingini, meðan Russland og Kina siga kortanei. Serbia vil hava trygdarráðið at lýsa loysingina ógylduga, men tað vil trygdarráðið ikki.

USA viðurkendi í gjár Kosovo, og í gjárkvøldið kunngjørdi serbiska stjórnin, at hon hevði givið sínum sendiharra í Washington boð um at koma heim. Vojislav Kostunica, forsætisráðharri, segði, at sendiharrarnir í londum, sum viðurkenna Kosovo, fáa somu boð sum sendiharrin í USA.

Serbiska tjóðartingið samtykti í gjárkvøldið at ógilda avgerðina hjá kosovoalbanska meirilutanum at loysa. Við 225 av teimum 250 atkvøðunum samtykti tingið, at yvirlýsingin úr Pristina er í stríð við serbisku grundlógina og brot á landsins fullveldi. Samstundis varð gjørt greitt, at Serbia tryggjar sær rætt til at draga teir kosovoalbansku leiðararnar fyri rættin fyri at hava brotið serbisku grundlógina.

*- Vit fara ongantíð at viðurkenna eitt sjálvstøðugt Kosovo*

## STUTT SAGT

### Diana og Dodi vórðu myrd

Mohamed al Fayed segði í einari hoyring í London í gjár, at tað er eingin ivi um, at bretska kongshúsið gav boð um at myrða son hansara, Dodi Fayed, og Dianu prinsessu. Mohamed al Fayed segði, at Charles prinsur vildi sleppa at gifta seg við Camillu Parker Bowles, og at hann tí mátti rudda Dianu av vegnum. Hann vildi eisini vera við, at tað eru fleiri enn hann, sum halda, at kongshúsið gav boð um at myrða Dodi og Dianu. Millum annað segði hann, at Condon lordur, sum er fyrrverandi løgregluovasti í London, er samdur við sær. Sambært Mohamed al Fayed fekk kongahúsið fregnartænastuna MI6 til at leggja bilvanlukkuna í París til rættis.

### Løgreglan tikin

Myndugleikarnir í Etiopia hava tikið meiri enn 300 løgreglumenn, tí myndugleikarnir hava illgruna um, at løgreglumenninir hava hjálpt einum uppreistrarfelagsskapi, sum hevur gjørt um seg í landspartinum Ogaden. Almenna tíðindastovan skrivar, at teir tiknu løgreglumenninir hava hjálp uppreistrarfelagsskapinum ONLF, sum berjist fyri at loysa Ogaden frá Etiopia. Í fjør søkti hesin felagsskapurin at einum oljuverki, og 77 fólk lótu lív.

### Condello tikin

Í meiri enn 20 ár hevur italska løgreglan leitað eftir mafia-leiðaranum Pasquale Condello, sum hevur verið mettur sum ein av ovastu leiðarunum í mafiakervinum Ndrangheta. Í gjár kom løgreglan endiliga fram á hann í einari íbúð í býnum Reggia Calabria, og tann 57 ára gamli mafialeiðarin gjørdi ikki mótstøðu, tá løgreglan kom innar til hansara. Sambært Sky News hevur mafiakervið hjá Condello smuglað nógv rúsevni úr Kolumbia til Evropa.